Vikuskiftið Sosialurin






# Sansir søkja fíggjarleiðara

Sansir er ein fyritøka í stórari framgongd, og umsetningurin er trífaldaður seinastu 4 árini. Vit hava sett deild á stovn í Keypmannahavn, og ætlanin er næstu árini eisini at seta deildir á stovn aðrastaðni.

Av tí at virksemið hjá Sansum er vaksið, er eisini neyðugt, at Sansir fær eina nýggja, dygga fíggjarstýring. Hesa fíggjarstýring skalt tú verða við til at uppbyggja saman við leiðsluni, okkara fyriskipara og kt-leiðara.

Tú fært ábyrgdina av rakstrar- og íløgufíggingini, av dagliga bókhaldinum, herímillum at leggja fíggjarætlanir, at gera mánaðar- og ársroknskapir, at greiða lønarviðurskiftini hjá starvsfólkunum o.a. Tú kemur í byrjanini at taka tær av sjálvum bókhaldinum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú HD í roknskapi ella cand. merc.

Tú hevur hollan kunnleika til bókhald og roknskap, og tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Sansir eru ein framfýsin samskiftis-fyritøka við 33 starvsfólkum í fýra ymiskum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum verður við til at skapa framtíðina saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. mai klokkan 16. Umsóknir kunnu sendast við vanligum posti ella við telduposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga viðmerk tín teldupost og títt fartelefonnummar.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr ella Høgna Rasmussen á tel 355 355. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

Send umsóknina til:

Sansir
Dvørgastígur 7
Postsmoga 1099
FO-110 Tórshavn.

SANSIR

sansir.fo

## Norðoyatunnilin og Vágatunnilin



# 25% bíligari

**4. juni verður nógv bíligari at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar báðar.**

Ferðandi í Vága- og Norðoyatunlinum, ið ferðast stakferðir ella við kubba, skulu gjalda umleið 25 prosent minni fyri ferðir sínar frá 4. juni 2007. Árshaldið lækkar 10 prosent frá sama degi.

Avslátturin er sjálvvirkandi fyri tey, ið hava hald frammanundan, soleiðis at minni verður tikið fyri hvønn túrin, eftir at prísurin er lækkaður. Hetta svarar til, at fyri hvørjar 4 túrar, ið vóru eftir á kontuni, verður 1 túrur lagdur afturat.

Prístalva

| Søluprísur (kr) | 1 túrur kr t/r | 5 túrur kr t/r | 20 túrur kr t/r | 40 túrur kr t/r | Árshald kr/mðr |
|---|---|---|---|---|---|
| Bilar upp til 3500 kg, styttri enn 6 m | **130** | **104** | **78** | **65** | **900** |
| Kostnaður fyri hald | | 520 | 1.560 | 2.600 | 10.800[2] |
| | | | | 1.800[1] | - |
| Bilar millum 6 og 12,5 m | **350** | **280** | **210** | **-** | **-** |
| Kostnaður fyri hald | | 1.400 | 4.200 | - | |
| Bilar yvir 12,5 m | **530** | **424** | **318** | **-** | **-** |
| Kostnaður fyri hald | | 2.120 | 6.360 | - | - |
| Depositum fyri kubba | | **300** | **300** | **300** | **300** |

Gev gætur:

**1)** Samlaður prísur fyri hald við 40 túrum, tá ið mánaðaravsláttur verður roknaður uppí. Mánaðaravsláttur 400 kr verður latin privatkundum, ið koyra minst 20 túrar í einum kalendaramánaða, við sama bili í sama tunli. Sparingin er tá 65%

**2)** Samlaður prísur fyri árið. Haldið verður teknað fyri 1 ár í senn og kann ikki sigast upp. Gjaldast skal mánaðarliga forút gjøgnum GS-avtalu. Árshald verður teknað fyri hvønn tunnilin sær.

Orsakað av einari vaksandi arbeiðsbyrðu hjá avgreiðslu okkara, hava nevndirnar samtykt, at avgreiðslugjøld skulu takast fyri ávísar tænastur.

**Nýggju avgreiðslugjøldini eru:**

- 250 kr. fyri fyribilsflyting av kubba millum bilar.
- 50 kr. fyri avgreiðslu av túrum hjá bilum, sum hava hald, men hava koyrt uttan kubba, ella har haldið hevur verið í eftirstøðu.
- 15 kr. fyri kontuavrit og túrútskrift.

Omanfyristandandi broytingar eru framdar í viðskiftatreytum felagsins og eru galdandi frá 25. juni 2007.

Sí eisini viðskiftatreytirnar á www.tunnil.fo.

www.sansir.fo

VÁGATUNNILIN NORÐOYATUNNILIN

Skansavegur 7, Postrúm 1010, FO-110 Tórshavn, Tel 350200, Faks 350201, www.tunnil.fo

Lesið Sosialin -tað loysir seg

# FØRARI TIL betongpumpubil

Søkt verður eftir førara til betongpumpubil.

Talan er um støðugt arbeiðið.

Teir, ið settir verða kunnu byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

**J & K Petersen Contractors**

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585025 · betong@jkp.fo

## Campingvognur til sølu

Hobby 650 Umfe árg. 2006 til sølu.

**Nærri fæst at vita á tel. 517316**

## Vága Gongufelag

Um viðrar verður gongutúrur niðan á Egg og suður á Bøsdalafoss 2. hvítusunnudag 28. mei. Túrurin byrjar uppi á Mýrum í Sørvági kl. 14 og varar umleið 4 tímar.

## Útleigan til fyritøkur

Møbelerað hús mitt í Havn verður útleigað til fyritøkur frá 1. august 2007.

**Ring á tlf. 0045 30 51 75 32**

## Hús í Vági til sølu

Sethúsini – Toftalíð 24, matr. nr. 92 – til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. nr. 373044 - 583044**